## Løgreglan rendi á

Nýggjársnátt rendi ein bilur hjá løgregluni í Glostrup á eina 62 ára gamla kvinnu har vesturi í Keypmannahavn. Kvinnan varð alt fyri eitt flutt á sjúkrahús, og har vísti tað seg, at hon hevði fingið beinbrot og skallabrot av stoytinum. Løgreglan í Glostrup sigur, at løgreglubilurin, sum rendi á kvinnuna, koyrdi ikki skjótt, tí hann var á vanligari kanningarferð, tá óhappið hendi. Førarin varnaðist kortini ikki kvinnuna, fyrr enn ov seint var.

## Eldur í bátum

Ikki færri enn ellivu bátar kolaðust upp, tá eldur kom í ein goymslubygning í norska býnum Flekkefjord nýggjársaftan. Løgreglan í Agder sigur við Aftenbladet, at átta bátar við húsinum har frammi fóru so illa, at teir kunnu ikki gerast aftur, og tað sama er galdandi fyri tríggjar minni bátar. Tíggju av teimum ellivu bárunum vóru úr glastrevju. Enn veit løgreglan ikki, hví eldurin kyknaði, og nógvur hiti á staðnum hevur darvað kanningunum.

# 177 kilo eftir tveimum tímum



*Hetta minnir mest um ein Dødens Gab-film. Spennandi verður at frætta nærri um, hvør man fanga størsta hemaran innan 1. mars*



*Hann hevur alla orsøk at vera errin – Jóannes Gaard, sum her er avmyndaður saman við 177 kilo stóra hemara sínum*



*Hemaraveiðan hevur stóran áhuga millum manna. Tað er helst ikki so ofta, at slíkir kroppar eru at síggja á Havnarkaj*

**Jóannes Gaard er sera áhugaður at veiða hemarar, ikki minst tá talan er um kapping við aðrar.**

**Millum jóla og nýggjárs fekk hann tann higartil størsti hemaran uppá land – 177 kilo stórur**

FISKIKAPPING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Magni Blástein*

**Hemarar:** Kappingin "Shark Atlantic 2006" hevur víst seg at hava alstóran áhuga millum menn.

Síðani kappingin byrjaði í november mánaði í fjør, hava fleiri verið á heimaraveiðu, og tað skilst at menn eru sera spentir eftir endaliga úrslitinum.

Hetta er ikki uttan orsøk, tí tað er ein rættiliga góður vinningur sum bíðar honum ella henni, sum veiðir størsta hemarin.

Ikki færri enn 25.000 kr. verða lætnar fyri fyrstaplássið, 10.000 kr. fyri næsta og 5.000 kr. fyri triðja plássið.

Kappingin byrjaði í november og varir fram til 1. mars í ár. Tað vísir seg, at støddin og vektin á teimum veiddu hemarunum økist alsamt.

### Tveir hemarar higartil

Fleiri mans hava longu verið á hemaraveiðu – og hava fingið góðan fong.

Mikudagin í farnu viku – 3. jóladag – fór Jóannes Gaard frá bryggju og legði leiðin suðureftir.

Komin nakað suður úr Kirkjubønesi "kastaði" hann og nakað seinni beit á hjá honum.

Jóannes var tá staddur einar 100 metrar úr landi.

Men helst kom tað óvart á Jóannes, at tað skuldi taka so langa tíð at fáa henda stóra hemaran at borði í bátinum.

Í slakar tveir tímar – tað er: ein tíma og 55 minuttir - stríddist Jóannes og vinmaður hansara, Bogi Jacobsen, við at møða hann og síðani fáa lívið av honum. Spurningurin er helst, hvør var mest troyttur av teimum báðum.

Tá teir so komu at vektini og tummastokkinum, kundu teir – fróir og ikki sørt ernir! – staðfesta, at tað var stríðið vert: Hann vá nevniliga 177 kilo og var 168 sentimetrar stórur.

Hóast kappingin enn bert er hálvrunnin, hevur fyriskiparin av kappingini, Magni Blástein longu staðfest tríggjar rættiliga stórar hemarar:

Jóannes Gaard eigur tann størsta, Heini Weihe tann næststørsta uppá 170 kilo og hesi sami, Jóannes Gaard aftur við 95 kilo.

## Shark Atlantic 2006

Kappingin er ætlað bæði føroyingum og útlendingum, og er stuðlað av tryggingarfelagnum Trygd.

Hon byrjaði 1. november í fjør og endar 1. mars í ár.

Tað er ikki óvanligt at menn fáa hemarar millum 100 og 200 kilo í havøkinum kring Føroyar.

Fyriskipari er Magni Blástein í Vestmanna.